


*Faroe Petroleum arbeiðir á Atlantsmótinum, sum umfatar Føroyar-Hetland økið og síðani eisini Norðsjógvin.*
*Kelda: Faroe Petroleum*

hjálp í føroyska samfelagnum uppá ymsar mátar. Um tað er sum leitifelag, framleiðslufelag ella tænastufelag í oljuvinnuni, tað er so tað. Men eg haldi, at tað er gott at hava tvey føroysk feløg, og tað er sum sagt pláss til fleiri, og eg vóni fólk her á landi í framtíðini síggja tað sum ein møguleika.

## Ikki alment oljufelag enn

-Tá tú nevnir fleiri oljufeløg, so hevur eitt alment føroyskt oljufelag eisini verið nevnt í orðaskiftinum, eitt nú í sambandi við 3. útbjóðing á tingi. Eiga Føroyar at fáa eitt alment oljufelag eisini fyri at tryggja seg best?

-Man má spyrja, hví man skuldi ynskt tað. Í dag er eingin olju- ella gassframleiðsla í Føroyum, og higartil er einki lønandi fund gjørt. Tað er ein góður spurningur, um eitt alment føroyskt oljufelag hevði kunnað gjørt mun í tí høpinum. Vit vita, at tað krevur eina rúgvu av pengum, og onkur skal gjalda fyri hesar brunnarnar. Ein brunnur kann kosta millum 200 og 500 mill. Kr. Tað eru nógvir pengar serliga í dag, har kappingin er hørð um boripallar. Eg sjálvur haldi ikki tíðin er tann rætta enn at hava eitt alment føroyskt oljufelag.

-Hyggja vit eftir útviklinginum í Danmark og Noregi, so hava teir almenn olju- og gassfeløg. Meinar tú at tá og um vit finna oljuna ella gassið, tá eiga vit at taka spurningin um alment oljufelag upp?

-Tá hevði verið grundarlag fyri at tikið tann tankan upp. Tað verður so altíð ein politiskur spurningur. Tað eru ikki øll lond, sum ynskja hetta. Hetta er so eisini ein luksusavgerð at skula taka.

-Tit umhugsa í løtuni at skráseta tykkum á enn einum børsi!

-Vit hava rættiliga nógvar føroyskar íleggjarar, sum vit vita hava tað trupult við at handla við okkara partabrøvum, og vit ynskja at gera hetta so lætt sum møguligt. Tað at vit eru børsskrásettir í London ger tað nevniliga ikki lætt, og tí hugsa vit um møguliga at skráseta okkum í Keypmannahavn ella í Oslo aftrat og møguliga fara frá tí lægri marknaðinum AIM í London og upp til høvuðsmarknaðin har. Tað kemur í sambandi við, at felagið er við at búnast og er vorðið størri,og vit eru í dag í tí størra endanum á AIM, og kunnu nú umhugsa at fara víðari. Tað er m.a. hetta vit hava umrøtt saman við góðum fólkum frá føroysku figgingarstovnunum, hvørji ynski og ráð tey hava.

Ikki klárir at blíva uppkeyptir

-Vit hava hoyrt, at tað er áhugi hjá øðrum oljufelag at keypa tykkum!

-Vit eru ikki uppkeyptir enn, men tað er altíð ein møguleiki fyri tí. Tá man er børsskrásettur og er eitt alment felag so er vandi altíð fyri tí, at onkur annar vil keypa. So tað er møguli-



*Umboð fyri fíggjarstovnar tosa við umboð fyri Faroe Petroleum*
*Mynd: Jan Müller*